# Brævbjálvi fyri 30.000




*Hetta brævið varð selt fyri 30.000 krónur. Legg til merkis, at tvey av frímerkjunum eru skrødd, og tað er ein av orsøkunum til, at brævbjálvin er virðismikil*

**Í november mánaði varð skipað fyri uppboðssølu á Børsen í Keypmannahavn. Har vóru fleiri føroysk frímerki og pengaseðlar til sølu. Ein brævbjálvi, sum varð sendur í 1919, fór fyri 30.000 krónur. Annars sóknast samlarar eftir einum føroyskum stempli, har tað stendur "RUTH". Eigari av einum slíkum kann fáa góðar 100.000 krónur fyri tað**

FRÍMERKI
*Stefan í Skorini*

Nógvur peningur kann vera at fáa, um tú hevur okkurt gamalt og áhugavert bræv liggjandi í óruddinum á loftinum.

Onkur hevur í øllum førum gjørt kubbi við at selja eitt gamalt føroyskt bræv.

Talan er um ein brævbjálva, sum varð sendur til Føroya Banka í Tórshavn tann 23. januar 1919. Brævið varð eisini sent úr Havnini, og frímerkini høvdu tá eitt virði á 22 oyru.

Tað, sum samlarar halda vera áhugavert við brævinum, er, at tvey av frímerkjunum eru skrødd.

– At frímerkini eru skrødd vísir, at hetta brævið ikki er gjørt til samlarar, men at tað veruliga hevur verið í brúki. Hetta er orsøkin til, at tað hevur so stórt virði. Tá í tíðini vóru tað bara Føroya Banki og handilsmenn, sum fingu hesi 2 oyru frímerkini, sigur Suni Vinther.

Onkur hevur verið sinnaður til at lata 30.000 fyri henda brævbjálvan.

Suni Vinther, filetelist ella frímerkjasavnari, var til staðar á uppboðsøluni í Keypmannahavn, og hann sigur, at har vóru fólk úr øllum heiminum komin saman at fregnast um nakað áhugvert var til sølu.

Hann veit ikki, hvør hevur átt júst hetta brævið, men hann væntar ikki, at tað er ein føroyingur, sum í hesum førinum er vorðin 30.000 ríkari. Tey flestu dýru føroysku frímerkini eru í farin av landinum.

– Tað eru nógv fólk, sum halda, at eitt skrætt frímerki ikki hevur nakað virði, men ein skal ongantíð tveita nakað gamalt burtur, uttan at onkur serkønur á økinum hevur hugt at tí fyrst, sigur Suni Vinther.

### RUTH

Eitt annað sera áhugavert føroyskt frímerki, sum varð selt á uppboðssøluni, er eitt við stemplinum »RUTH«. Tað varð keypt fyri 17.000 krónur.

Hetta er bara eitt einstakt frímerki, sum er tikið av einum brævbjálva ella postkorti. Hetta stemplið er sera rárt.

Tað serliga við hesum stemplinum er, at postbáturin »RUTH« hjá meiarínum fekk eitt stempul umborð í 1908. Hann sigldi millum Havnina, Skálafjørðin, Kollafjørð og Kaldbak.

Um eitt bræv skuldi sendast millum onkrar av hesum bygdunum, so varð tað stemplað umborð á bátinum.

– Eingin hevur enn funnið nakað postkort ella bræv við hesum stemplinum, men bara leys frímerki.

– Tann, sum í dag finnur eitt bræv við hesum stemplinum, hevur vunnið í lotto. Tað kann seljast í dag fyri góðar 100.000 krónur, heldur Suni Vinther.

Suni væntar, at tað eru fólk kring Skálafjørðin, Kollafjørð og Kaldbak, sum hava besta møguleikan at finna tað, tí móttakari og sendari skal helst vera á Skálafjørðinum. Um bræv varð sent við postbátinum til Havnar, so hevði tað verið stemplað á posthúsinum í Havn.

– Um eitt bræv við stemplinum »RUTH« verður funnið, so eru samlarar óivað púra svakir eftir at fáa hendur á tí, sigur Suni.

### 100 krónuseðil fyri 20.000

Á uppboðssøluni var eisini nakað fyri numismatikararnar ella mynt- og pengaseðlasavnarar.

Ein føroyskur 100 krónuseðil frá 1940, varð seldur fyri 20.000 krónur.

Tað áhugaverda við hesum seðlinum er, at Amtmaðurin Hilbert hevur prentað sítt navn á seðilin. Annars var tað vanligari, at hann signeraði seðlarnar við hond.

Annars vórðu fleiri áhugaverd føroysk brævbjálvar og frímerki seld fyri millum15-25.000 krónur.

– Tað er ómøguligt hjá vanligum fólki at meta um, hvat er virðismikið. Tað er neyðugt at fáa ein serkønan at meta um tað, sigur Suni Vinther.

Sum dømi kann nevnast, at eitt bræv, sum varð sent frá Hvalba til Havnar um Trongisvág, fór fyri 23.000 krónur.

Tað merkisverda við tí er, at postverkið hevði trupulleikar við at fáa frímerki, tí myndugleikarnir høvdu hækkað porto úr fimm upp í sjey oyru, og kríggið forðaði flutningi av nýggjum frímerkjum millum Føroyar og Danmark.

Tí varð neyðugt at klippa frímerki burturúr krossbondum, sum vórðu nýtt, tá blød skuldu sendast. Hesi vóru ikki verulig frímerki við takkum, men vórðu bara prentað.

Suni Vinther var á uppboðssøluni og seldi fyri fólk, sum eiga virðismikil frímerki og brævbjálvar. Tilsamans seldi hann fyri góðar 10.000 krónur. Fólk hava heitt á hann um at selja frímerki fyri seg.

Hann sigur, at nógvir ríkmenn hava áhuga í at keypa rár frímerki. Teir gera íløgur í frímerki, og kunnu síðani selja tey aftur seinni við vinningi.

Í Føroyum er áhugin fyri filateli ikki serliga stórur. Á vanligum fundum hjá filatelistfelagnum møta eini tíggju fólk hvørja ferð, men felagið hevur eini 25 limir.



*– Um onkur finnur ein brævbjálva ella postkort við stemplinum »RUTH« so hevur hann gjørt kubbi, tí tað kann seljast fyri 100.000 kr., sigur Suni Vinther, filatelist*




*100 krónuseðil fyri 20.000 krónur. Hesin føroyski pengaseðilin er virðismikil, av tí at undirskiftin hjá amtmanninum er prentað og ikki skrivað við hond*

## Sinnisbati mótmælir

Fyri jól sendi felagið Sinnisbati almanna- og heilsumálastýrinum og Landssjúkrahúsinum eitt mótmælisskriv.

Sinnisbati mótmælir harðliga í skrivinum, at psykiatiska deild 1 á Landssjúkrahúsinum er stongd í tíðarskeiðnum 22. desember til 8 januar.

Felagið hevur áður gjørt vart við tær óhepnu og ørkymlandi avleiðingarnar, ið kunnu standast av, at sinnisliga sjúk fólk verða tvangsflutt á aðrar psykiatriskar deildir ella at fara heim í úrtíð.

Sinnisbati mótmælir hesi mannagongd, fer gjølla at fylgja við málinum og vónar, at hetta ikki fer at endurtaka seg í framtíðini.

Endamálið hjá felagnum Sinnisbata er, at bøta um korini hjá sinnisbrekaðum, at útvega teimum vardar íbúðir og at finna teimum hóskandi arbeiði og frítíðarítriv.



Anfinn Kallsberg, løgmaður:

# Var ikki ov harður við danir

**Løgmaður vísir frá sær atfinningunum frá donskum fjølmiðlum og føroyskum andstøðupolitikarum, um at hann í nýggjársrøðu síni var ov harðrendur móti donsku stjórnini**

NÝGGJÁRSRØÐAN
*John Johannessen*

– Okkara mótpartur noktaði at fylgja vanligum samráðingarreglum og breyt ferð eftir ferð tær avtalur, vit gjørdu.

Millum annað soleiðis lýsti Anfinn Kallsberg, løgmaður, í nýggjársrøðu síni leiklutin hjá donsku stjórnini í samráðingunum um føroyskt fullveldi.

Hetta brotið varð endurgivið í donskum fjølmiðlum, sum søgdu, at løgmaður var harðrendur móti donsku stjórnini. Og hesa somu fatan hava formenninir fyri báðir teir stóru andstøðuflokkarnar í Føroyum, Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard. Edmund Joensen segði við Sosialin í gjár, at hann var skelkaður av teirri viðferð, sum danski forsætisráðharrin og danska stjórnin fingu í røðuni, meðan Jóannes Eidesgaard segði, at hvøssu orðini skurraðu eitt sindur í oyrunum.



### Bert staðfestingar

Men løgmaður er ikki samdur við føroysku andstøðuleiðarunum og donsku fjølmiðlunum.

– Tað, sum eg segði í nýggjársrøðuni um samráðingarnar, vóru bert staðfestingar. Og at danskir fjølmiðlar fáa tær til at vera harðiligar útsagnir er ikki annað, enn vanliga viðferðin, vit fáa frá donskum fjølmiðlum, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður vísir eisini á, at eingin í Føroyum kallaði røðuna fyri harðrenda, fyrr enn danskir fjølmiðlar høvdu gjørt hana harðrenda.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sigur í viðmerkingum sínum til nýggjársrøðuna, at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin í veruleikanum eru innarliga fegnir um, at samráðingarnar miseydnaðust, so teir fingu høvi at leggja kósina um.

– At løgmaður turkar samráðingarúrslitið upp á danir er ein lættur máti at koma uttan um, at tað í veruleikanum fer ein innanhýsis telving fram í samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hesa viðmerking heldur løgmaður vera púra burturvið.

– Jóannes veit betur enn so. Tað, sum er hent er, at vit hava fingið staðfest, at tað ber ikki til at fáa eina nøktandi avtalu í lag við donsku stjórnina. Tí hava vit gjørt av at finna eina aðra loysn, har vit sjálv arbeiða okkum fram til fullveldi, ger løgmaður greitt.

### Greið ætlan

Formaður Sambandsfloksins, Edmund Joensen, sigur í sínum viðmerkingum til røðuna, at løgmaður skyldar føroyingum eina frágreiðing um, hvat tað er fyri fullveldisætlan, sum landsstýrið arbeiðir við. Hann vísir á, at enn sita øll púra óvitandi um ætlanina, hóast tað bert eru tríggir mánaðir til vit skulu til eina fólkaatkvøðu.

At eingin fær nakað at vita um ætlanina, heldur Edmund Joensen vera orsakað av, at landsstýrið ikki sjálvt veit, hvat tað er í ferð við.

Men eisini hesum atfinningunum vísir Anfinn Kallsberg, løgmaður, frá sær.

– Innihaldið í fólkaatkvøðuni er púra greitt, hóast vit enn ikki hava sett nakra dagfesting á, nær hvørt einstakt málsøki skal yvirtakast. Vit hava eina ætlan í trimum stigum. Fyrsta stigið inniber, at vit gera eina avtalu við donsku stjórnina um at vit yvirtaka øll málsøki, sum ikki eru ríkismál. Næsta stigið er, at vit niðurlaga blokkin, til hann er burtur. Triðja stigið er síðani ein nýggj fólkaatkvøða um føroyska grundlóg, sum staðfestir føroyska suverenitetin, ger løgmaður greitt.

Anfinn Kallsberg sigur, at tað í løtuni tykist, sum at andstøðupolitikarar eru ónøgdir við, at beinleiðis dagfesting ikki er sett á, nær hvørt málsøki verður yvirtikið. Men hann vísir á, at hetta ikki ber til, fyrr enn ein avtala er greið við donsku stjórnina, um hvussu vit sleppa at yvirtaka.

Hesa avtaluna roknar Anfinn Kallsberg at hava fingið undir land í endanum av hesum mánaðinum, og tá kann farast undir at fyrireika fólkaatkvøðuna, staðfestir hann.



*Anfinn Kallsberg var heldur harðrendur mótvegis dønum í nýggjársrøðuni*

Norðurlendskt tænastumannaumbýti

## Freistin er longd til 16. februar

TÍÐINDASKRIV

Vegna tess, at peningur er eftir at søkja fyri ár 2001, verður freistin longd til 16. februar 2001.

Norðurlendska tænastumannaumbýtisskipanin ger tað møguligt hjá starvsfólk í landsfyrisitingini at fara til eitt av norðurlondunum at arbeiða í eina tíð.

Stuðul verður veittur til at gjalda ferða- og uppihaldsútreiðslur hjá luttakara.

Endamálið við skipanini er at fremja norðurlendskt samstarv og geva luttakarunum kunnleika til m.a.fyrisiting og lóggávu í hinum norðurlondunum.

Føroyar hava fyri ár 2001 fingið tillutað kr. 61.000,-. at nýta til hesa skipan.

Umsóknarfreistin er 16. februar 2001. Umsóknir, sum koma inn aftaná hesa dagfesting, verða bert viðgjørdar, um peningur er tøkur.

Nærri upplýsingar um skipanina fáast við at venda sær til Løgmansskrivstovuna – nýskipanardeildina og fáast eisini við at fara á heimasíðuna hjá Nordisk Ministerråd. http: //www.norden.org og hyggja undir Støtteordninger og Nordisk utbytestjänstgöring, sigur løgmansskrivstovan.

